# Føli meg væl brynjaðan at taka avbjóðingina á meg

**– Nú má eg fyrst stinga fingurin í jørðina fyri at vita, hvar alt flýtur, áðrenn eg kann siga, hvussu míni fingramerki fara at síggjast aftur, sigur nývaldi landsstýrismaðurin**



*Løgmaður ynskir Jacob Vestergaard vælkomnum í Tinganes. Nýggi landsstýrismaðurin følir seg væl brynjaðan at átaka sær avbjóðingina*

LANDSSTÝRISMANSSKIFTI
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta verður ein avbjóðing. Men hetta er ein avbjóðing, sum eg føli meg brynjaðan til at taka á meg.

Jacob Vestergaard, nýggjur landsstýrismaður í innlendinsmálum, sigur, at tað er nokk so knappliga, at honum stóð í boði at verða nýggjur landsstýrismaður í innlendismálum.

Jacob Vestergaard hevur royndir úr Landsstýrinum, tí hann var eitt skifti landsstýrismaður í fiskivinnumálum í seinastu samgongu.

Hann hevur verið bygdaráðspolitikari og borgarstjóri í Sumbiar Kommunu í fleiri valskeið og hann hevur verið formaður í Føroya Kommunufelag.

Sostatt er hann væl kunnigur við kommunupolitikk.

Samstundis er hann løgreglumaður og haðani frá kennir hann til teir trupulleikar, ið umsitingin av útlendingamálum kann føra við sær.

So alt í alt er hetta ikki ein uppgáva, sum hann stúrir fyri at átaka sær.

Hinvegin heldur hann, at enn er ov tíðliga at siga ov nógv ítøkiligt um førda politikkin, tí hann má fyrst seta seg inn í ætlaða politikkin og finna útav, hvat er sett í verk og fylgja tí upp.

– Eg fari fyrst at stinga fingurin í jørðina fyri at vita, hvar tey ymsu málini flóta. Fyrrenn eg havi sett meg inn í tað, er torført at siga, hvussu míni fingramerki fara at síggjast aftur í førda politikkinum hjá samgonguni.

### Økt túratal við Smyrli

Men nú skal tú umsita samferðslumál. Eitt tað fremsta málið á samferðsluøkinum seinastu tíðina, hevur verið túratalið hjá Smyrli. Tú hevur verið formaður í samferðslubólkinum í Suðuroy og har hevur tú verið heitasti talsmaður fyri at hann skal sigla ein túr afturat um dagin. Kemur hann nú?

– Eg haldi framvegis, at nýggi Smyril skal sigla tríggjar túrar. Men tingið akkurát felt eitt uppskot um at hann skal sigla tríggjar túrar, so vit kunnu siga, at vit kenna tingsins vilja.
– Kortini hevur samgongan boðað frá, at hon er sinnað at arbeiða fram ímóti at økja túratalið og tað fari eisini at gera, tí eg haldi, at Smyril skal sigla minst tríggjar túrar um dagin, sigur nýggi Landsstýrismaðurin.

Kortini ásannar hann, at tað verður neyvan beint nú, at túratalið verður økt, tí fíggjarlógin er til viðgerðar og har er onki sett av til tað. Men tað er ongin ivi um, at tað skal arbeiðast fram ímóti tí, staðfestir hann.

Tú hevur eisini talað ímóti at flyta miðnámsskúlan úr Vági ?

– Eg havi altíð hildið, at varð semja í Suðuroy um viðurskiftini, átti tað at borið til at arbeitt eftir tí. Men tann semjan var ikki og so var ein avgerð tikin. Kortini haldi eg ikki, at tað er so avgerandi, hvar í Suðuroynni, tað ymsa verður bygt, tí vit mugu meta Suðuroynna sum eina heild og at taka avgerðir útfrá tí.

### Royna at finna smidligari skipan

Kortini skerst ikki burtur, at tyngsta og mest umstrídda málsøkið, sum Jacob Vestergaard fer at umsita, er útlendingapolitikkurin.

– Eg haldi, at tað er rættast at yvirtaka málsøkið, so vit hava fult ræði á tí og høvdu eina føroyska lóggávu at arbeitt eftir. Men vit mugu ásanna, at tað verður ikki við samgonguni, sum nú er, at málsøkið verður yvirtikið. Tí mugu vit viðgerða málsøkið útfrá teirri fortreyt, sum er. Men av tí, at innlendismálaráðið skal málsviðgerða eitt málsøkið, sum í veruleikanum er danskt, er talan um eitt sera trupult málsøki.

– Men vit eiga at royna at finna ein smidligari mannagongd, men tað er sera trupult, viðgongur hann.

# Fólkaflokkurin vildi hava eina nýggja byrjan

**Hjá fólkaflokkinum var talan um eitt einfalt mál. Vit vildu gera broytingar fyri at styrkja flokkin, sigur Jørgen Niclasen, formaður fólkafloksins á tingi**



*– Vit vildu hava broytingar, tí vit vildu hava eina nýggja byrjan ogskuldu broytingar gerast, var hetta rætta tíðin, sigur Jørgen Niclasen, formaður fólkafloksins á tingi*

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var fólkaflokkurin sjálvur, sum vildi hava Jógvan við Keldu frá.

Tað staðfestir Jørgen Niclasen, formaður fólkafloksins á tingi.

Hann sigur, at fólkaflokkurin hevur í eina tíð tosað um at gera broytingar.

– Vit vilja hava eina nýggja byrjan. Vit halda at tað fer at geva flokkinum meiri at gera broytingar. At broyta eina stjórn er als ikki ókent í okkara grannalondum og í hesum føri hildu vit at tað var rætt at gera tað hjá okkum eisini.

Hann sigur, at hjá fólkaflokkinum var støðan rættiliga einføld, tí talan var rætt og slætt um at gera broytingar, sum kundi styrkja flokkin.

Og Jørgen Niclasen heldur, at skuldi fólkaflokkurin gera broytingar, skuldi tað vera nú

– Jógvan við Keldu hevur fingið tvey ár í landsstýrinum. Skulu vit hava nýggjan landsstýrismann, er tað eisini neyðugt, at hann fær stundir til at gera vart við seg og at seta síni fingramerki á førda politikkin.

Sostatt kemur Jógvan við Keldu aftur á Løgting, har hann verður partur í tingmanningini hjá fólkaflokkinum.

– Hann er ein sterkur tingmaður, so tað verður ein fyrimunur at fáa hann aftur í tingsessin, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at tað er serliga í útjaðarapolitikki, at Jógvan Við Keldu verður eitt íkast til tingmanningina hjá flokkinum, men hann hevur eisini verið sterkur og avhildin í norðurlendskum málum

– So vil bara tíðin vísa, um vit gjørdu rætt, leggur hann afturat.

### Framskundaði avgerðina

Sjálvt um tosað hevur verið um at gera broytingar í eina tíð, hendi skiftið nokk so knappliga.

– Jógvan við Keldu var ikki samdur í, at tað var neyðugt at gera broytingar og málið ar ikki avgreitt, tá ið tað brádliga tók eina nýggja vend hósdagin.

Og tað er ikki ósannlíkt, at Jógvan við Keldu varð við til at grava sína egnu grøv, tá ið hann kunngjørdi hóskvøldið í Norðlýsinum, á Portalinum og í Útvarpinum, at hann skuldi koyrast frá, men at hann fór ongan veg sjálvboðin.

– Tá var málið ikki liðugt viðgjørt, men við hesum hevur hann í veruleikanum sagt seg sjálvan upp og tað var við til at framskunda avgerðina um at gera broytingar. Vit boðaðu løgmanni frá støðuni hjá flokkinum og eftir tí loysti løgmaður Jógvan við Keldu úr starvi.

Samstundis heldur Jørgen Niclasen, at Jacob Vestergaard er ein vælskikkaður avloysari. Hann er løreglumaður og kennir sostatt til útlendingamálini. Hann hevur eisini verið borgarstjóri og formaður í Kommunufelagnum og kennir sostatt eisini til kommunumál.

### Tørfør málsøki

Jørgen Niclasen sigur, at tað skerst ikki burtur, at Jógvan við Keldu hevur havt torfør málsøki at umsita, eitt nú útlendingapolitikkin.

– Í hesum sambandi er ymiskt hent og sagt, sum hevur verið óheppið.

Formaður fólkafloksins á tingi vil kortini ikki nevna einstakar hendingar.

Samstundis hevur Jógvan við Keldu gjørt greitt, at hann stillar ikki uppaftur og vit hildu tað eisini vera rætt at hava ein landsstýrismann, sum kundi stilla uppaftur á einum komandi vali.

Jógvan við Keldu hevur fýlst á í útvarpinum og sjónvarpinum, at samgongan hevði torført við at taka avgerðir. Hann nevndi kommunusamanlegging og Farmaleiðir sum tvey dømi, har samgongan bara tosaði ístaðin fyri at taka avgerðir. Jørgen Niclasen er als ikki samdur.

– Viðvíkjandi kommunusamanlegging er tað semja í samgonugi um, at kommunur skulu ikki tvingast at leggja saman. Viðvíkjandi Farmaleiðum er semja um, hvussu tær skulu einskiljast, so tað hevur landsstýrismaðurin havt í egnum hondum.

– At vit so ikki halda, at semjan er tann besta, er annað mál, men hetta var so tað, ið semja kundi fáast um og tað var tað, vit høvdu at halda okkum til, sigur Jørgen Niclasen.